HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn, hin 26. mars 2021
Málnr.: 19/00656-2

**Kunningarskriv frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni**

# Áminning um *heilsufrøðiligu ásetingarnar,* tá umræður borðreiðing av livandi skeljum

**Hvørji skeljasløg snýr tað seg um:**
Skrivið snýr seg um livandi skeljar. Tað er øður, kræklingar, gággur, fliður og líknandi.

**Hvør er heilsufrøðiligi vandin, tá um tvískeljar ræður:**
Eyðkenni fyri tvískeljar er, at tær síðla føðina úr sjónum sum streymar millum skeljarnar. Sjógvurin letur skeljunum gagnlig føðsluevni, men í sama viðfangi kunnu eitrandi algur og sjúkuelvandi bakteriur – um hesi eru í sjónum – savnast í skeljavøddunum. Um skeljavøddar við skaðiligum evnum verða borðreiddir, kunnu fólk gerast sjúk – í besta føri fáa leyst lív, í ringasta føri verður andingarleiðin lammað.

Heilsufrøðiliga starvsstovan skal góðkenna tey, sum taka og veita livandi skeljar:
Tey, ið taka livandi skeljar til matstovur og handlar í Føroyum, skulu hava góðkenning til hetta virksemi frá Heilsufrøðiligu starvsstovu. Umsóknarblað og vegleiðingar til tøku av skeljum er at finna á hfs.fo.

**Endamálið** við góðkenningini er at matvøran skal vera trygg at eta. Hetta verður í høvuðsheitum skipað við tveimum stigum:

1. Møgulig veiðiøki verða kanna fyri sjúkuelvandi bakteriur, áðrenn tøka kann fara fram. Heilsufrøðiliga starvsstovan letur upp og steingir veiðiøki.

2. Teir góðkendu veitararnir skulu regluliga taka sýni av skeljavøddunum og kanna hesar fyri algueiturevni. Tøkuupplýsingar og kanningarúrslit verða síðani send Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum avgerð - grundað á úrslitini av kanningunum - um vøran kann nýtast til matna.

**Ábyrgdin hjá matstovunum**
Matstovur, sum taka ímóti livandi skeljum, skulu tryggja, at hesar koma frá góðkendum veitarum. Livandi skeljar frá góðkendum veitara skulu vera merktar við skrásetingarnummari, dagfesting fyri tøku og skeljaslag.

Forboð er fyri sølu av skeljum, sum ikki eru frá góðkendum veitara. Um Heilsufrøðiligu starvsstovan á eftirliti kemur fram á skeljar, sum ikki liva upp til treytirnar fyri sølu av livandi skeljum, verða hesar burturbeindar og møguliga eisini bót.

**Heimild:** Løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 13. juli 2017 og Kunngerð nr. 10 frá 5. februar 2009 um heilsufrøðiligar treytir fyri fiskiskapi, viðgerð, tilvirking og sølu av livandi tvískeljaðum lindýrum, tindahúðum, sjópungum, gággum og kúvingum.

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 556 400**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo